## Leita eftir fólki í leivdunum

Í miðamerikanska landinum Costa Rica leita bjargingarlið framvegis eftir fólki, sum komu at liggja undir húsaleivdum eftir tann harða jarðskjálvtan har í síðstu viku. Millum annað leita bjargingarlið í bygdini Cinchona, sum er tætt við gosfjallið Poas, tí hildið verður, at fleiri fólk liggja undir húsaleivdunum har. Myndugleikarnir søgdu í gjár, jarðskjálvtin kravdi 20 mannalív, men at 85 fólk eru ikki komin afturíaftur eftir skjálvtan, sum var tann harðasti í Costa Rica í 150 ár.



## Sjúrður og Heðin í Oslo

Hesa vikuna eru Sjúrður Olsen, annar varaborgarstjóri, og Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu, á høvuðsstaðarráðstevnu í Oslo, har evnið er "Trygg by". Á ráðstevnuni greiða umboðini fyri býirnir frá sínum royndum. Millum annað greiðir borgarstjórin frá, um, hvørji viðurskifti kunnu elva til tryggleika og ótryggleika millum børn og ung í Tórshavnar kommunu. Allar átta býirnir leggja fram, og eisini eru fyrilestrar og útferðir á skránni. Við í føroyska ferðalagnum eru Heðin Mortensen og Sjúrður Olsen, Jens Marius Poulsen, kommunustjóri og Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóri.

# elvtina av tíðini í fjør




*Soleiðis hava skipini hjá Fiskiveiðieftirlitinum ligið í ein stóran part av árinum í fjør. Samanborið við 2006 liggja tey heila 192 dagar fleiri tilsamans*

komi fyri, at ongin tyrla hevur verið til tænastu, men at hetta ikki er komi fyri, tá tað hevur verið tørvur á henni.

Hetta kann Jacob Vestergaard ikki góðtaka.

- Nú veit eg ikki so nógv um hatta, men tað sigur seg sjálvt, at ein tyrla altíð má vera til taks. Ongin kann vita nær tað er tørvur á henni, og tí er tað eitt ófrávíkiligt krav, at ein tyrla altíð er, greiðir avvarðandi landsstýrismaðurin frá.

### Mistu manning

Tá skipini í langum tíðarskeiðum lógu í fjør, vóru fleiri av manningini, ið fóru í onnur størv. Hesi størv vóru ikki sett aftur fyrr enn í septembur.

- Vit mistu nógva manning, tí teir byrjaðu at kenna á sær, at starvið ikki var so trygt, tí tað var upp á tal at spara eina manning burtur, greiðir Elmar Højgaard frá.

Vanliga eru fýra manningar tengdar at vaktar- og bjargingarskipunum, soleiðis, at helvtin er umborð og helvtin er í landi.

- Vit valdu at lata vera við at seta hesi størvini, tí vit vistu ikki, um vit fóru at hava nóg høga játtan til at hava fýra manningar, staðfestir Elmar Højgaard. Hann greiðir somuleiðis frá, at tað gjørdist trupult at fáa manning, tá teir fingu eykajáttanina. Tað hevði við sær, at manningarnar ikki vóru fullmannaðar fyrr enn í septembur.

Hann greiðir eisini frá, at tað kann verða ein trupulleiki, at fáa manning til skipini í framtíðini. Tí menn, sum sigla undir somu korum í Noregi til dømis, fáa dupult so nógv løn, sum teir, ið sigla fyri Fiskiveiðieftirlitið.

### Betring í ár

Hóast játtanin til Fiskiveiðieftirlitið ikki er líka stór, sum stovnurin ynskti, so metir Elmar Højgaard, at teir megna, at veita eina líknandi tænastu, sum í 2007. Tá vóru skipini í sigling í 469 dagar.

- Oljuprísurin er lækkaður nógv, og játtanin hjá okkum er vaksin eitt sindur. So mann kann rokna við, at um oljuprísurin ikki hækkar, ella lækkar meiri, so klára vit at vera úti í eina 480 dagar, sigur stjórin á Fiskiveiðieftirlitinum.

Jacob Vestergaard tekur undir við hesum og nevnir samgonguskjalið, har hert eftirlit er ein partur. Hann greiðir somuleiðis frá, at hann helst fer at biðja um eykajáttan, um tað gerst neyðugt.

Elmar Højgaard greiðir eisini frá, at skipini í dag ikki sigla líka nógvar fjórðingar, tí fiskiskipini verða fylgd á fylgisveini, og tí sigla vaktarskipini ikki í blindum longur, og hetta ger arbeiðið hjá Fiskiveiðieftirlitinum lættari.

### Manningin ger viðlíkahald

Teir dagarnir, sum koma undir sparing og annað, vóru tó í fjør nýttir til okkurt.

- Av tí, at vit ikki hava nóg stóra játtan til viðlíkahald, so royna vit at nýta manningina at gera viðlíkahald. Hetta gjørdu vit millum annað í hesi sparitíðini. Hóast manningin ger eitt stórt arbeiði, og skipini eru væl viðlíkahildin, so er tað ikki nøktandi, sigur Elmar Højgaard.

Jacob Vestergaard metir hinvegin, at manningarnar á vaktar- og bjargingarskipunum hava gjørt eitt sera gott viðlíkahald, og fortelur, at alt sum eitur klassing og størri viðlíkahald, sjálvandi verður gjørt á skipasmiðjunum.

Í ár skal allur motorurin á Brimli til klassingar.

### Bjarging tað hægsta

- Um sparingar verða neyðugar, so sigur tað seg sjálvt, at tað verður eftirlitið tað gongur útyvir. Vit kunnu ikki ganga á kompromi við trygdina. Tað má altíð vera fyrsti prioritetur. Men í samgonguskjalinum stendur at betri vaktarhald skal vera, so eg rokni við, at tað fer at ganga, sigur Jacob Vestergaard.

### Tjaldrið

| Ár | Viðlíkahald | Feria | Sparing/annað | Í sigling |
|---|---|---|---|---|
| 2006 | 80 | 42 | 19 | 224 |
| 2007 | 15 | 42 | 73 | 235 |
| 2008 | 39 | 42 | 120 | 164 |

*Kelda: Fiskiveiðieftirlitið. Tølini eru í døgum*